

**AFTUR REYTT**

*Santos - ein dýrur drongur*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Santos kostaði dýrt

**VODAFONEDEILDIN** Fyrst tveitti hann seg av fríum vilja, og tveir minuttir seinni framdi hann eitt grovt fríspark. EB/Streymur rann í mótgongd í seinna hálvleiki, tí Alex José dos Santos varð útvístur

Uni Holm Johannesen

| | |
|---|---|
| Víkingur | 2 |
| EB/Streymur | 2 |



*Kristoffur Jacobsen fekk hol á fyri EB/Streym*

Mynd: Álvur Haraldsen

Alex José dos Santos veit, at tað kostar dýrt at fáa reytt kort.

Fríggjakvøldið varð brasiliumaðurin útvístur fyri sættu ferð í føroysku landskappingini, síðan hann kom til Føroya undan kappingarbyrjan í 2004. Fimm av teimum seks ferðunum hevur tað ikki eydnaðst honum og liðfeløgunum at vunnið dystirnar. Hagtølini siga fýra ósigrar og ein javnleikur.

Tað var heppið, at tað yvirhøvur eydnaðist EB/Streymi at fáa eitt stig í útidystinum móti Víkingi. Sundalagsmenn høvdu fult tamarhald á støðuni og vóru á odda, tá seinni hálvleikur var átta minuttir gamal. Men so vísti Dagfinn Olsen, dómari, verjuleikarunum av vøllinum.

### Tað er tungt

Alex José dos Santos veit helst, hvussu tápulig bæði gulu kortini vóru. Fyrst tveitti hann av fríum vilja í eini roynd at fáa fríspark, og bara tveir minuttir seinni framdi hann eitt grovt fríspark. Lítið umhugsað av brasiliumanninum.

Tað tóktist, sum EB/Streymur fór at hóra undan, hóast alt, tí miðskeiðis í seinna hálvleiki økti Kristoffur Jakobsen um leiðsluna við brotssparki. Men so byrjaði mótbrekkan.

Gestirnir fluttu seg nakrar metrar longur aftur á vøllin, og at verja við einum manni minni varð strævið. Innskifti Súni Olsen minkaði fyrst um munin við beinleiðis frísparki, og Sølvi Vatnhamar javnaði, tá tveir minuttir restaðu í.

At spæla við 10 monnum er tungt. Tað sást serliga aftur seinasta korterið av dystinum fríggjakvøldið, tá sundalagsmenn ikki høvdu orku at fylla tómrúmini. Mótgongdin gjørdist størri og størri, sum minuttirnir gingu.

So hóast EB/Streymur hevði kós móti einum sigri, so skulu Heðin Askham, venjari, og leikarahópurin verða glaður fyri, at tað eydnaðist at fáa eitt stig, tí dystargongdin fekk eina brádliga vend.

uni@sosialurin.fo